

*Eg bart út sagt elski mjørka. Haldi tað vera so hugnaligt at ganga í havnargøtum, tá tjúkkur mjørki liggur millum húsini. Tokan gevur ein intiman stemning, ja, eitthvørt fjálgt og trygt er yvir henni, sigur Jákup Magnussen*

MYND: HILMAR JAN HANSEN

húsini. Tokan gevur ein intiman stemning, ja, eitthvørt fjálgt og trygt er yvir henni. Og tað er við mjørkanum, vindinum, regninum sum við øðrum lívsumstøðum, alt broytist, endar og gevur pláss fyri øðrum. Um tær ikki dámar mjørkan, er kanska best ikki at identifisera seg við hann. Hann er ikki partur av tær ella mær, men eitt fyribrigdi, sum gongur yvir.

**Eru skiftandi árstíðirnar ein mynd av lívinum?**

Ja, avgjørt. Eg haldi, at allar árstíðir hava stóran týdning. Um summarið blóma vit og eru útfarandi, liva okkara fysisku síðu, meðan vit um veturin søkja inneftir, gera upp, hugsa og gera niðurstøður. Um vit vilja tað ella ei, og lívsførslan kanska mótarbeiðir hesum, eru vit partur av náttúruni. Og eins og náttúran fer heim fyri at geva pláss fyri nýggjum til komandi vár, gera vit tað sama. Tað er tann universella ringrásin, sum eisini hevur stóran týdning fyri okkum og er ein mynd av okkum.

**Hvussu hevur tú tað, um føroyska summarið ikki er gott?**

Fyrr kundi eg gott geva føroyska veðurlagnum skyldina fyri mína ónøktandi støðu. Seinnu árini havi eg tó søkt hitan uttanlands, tí hiti er góður kropsliga. Aðrar orsøkir eru eisini til mínar uttanlandsferðir. Las eina bók fyri nøkrum árum síðan, har ein kendur høvundi ráddi fólki til at vitja nýggj støð einaferð um árið. Hann segði tað vera gott fyri sinnið, og eg má geva honum rætt. Eisini haldi eg, at tað er gott fyri meg sum føroying at vera anonymur ein part av árinum. Sjálvt um eg helst síggi meg sum ein, ið ikki tekur sær tykni av, hvat onnur siga og halda, so merki eg væl á mær, at mær tørvar broyting viðhvørt.

**Hvat er tað besta ein dag við bláum himni og bakandi sól?**

Eg kenni eina kvinnu, sum við sínum verumáta hevur mint meg á, at lívið er bara her og nú, og at eg sjálvur geri av, um eg havi gron ella smílist um alt andlitið. Eg havi í mínari sjálvsmenningargongd havt lyndi til at vera í so djúpur og at skula analysera alt. Onki eigur at takast frá sjálvsmenningini, tí hon hevur millum annað lært meg takksemi fyri at liva sum menniskja, men javnvág eigur at vera millum tann partin, sum vendir sær inneftir, og tann partin, sum av hesum sama heystar frið, gleði og nøgdsemi. Og tað er serliga ein slíkan kláran dag, at eg síggi lívsins undur.

**Hvat dámar tær best, summarlitir ella heystarlitir?**

Litirnir fylgja árstíðunum, so eg leggi ikki stórvegis í tær broytingar, sum henda. Men eg haldi allar litir vera vakrar, eisini heystarlitirnar, ið umboða afturvendanina til náttúruna. Tá tað kemur til klæðir, haldi eg tó, at fólk, sum ganga í ljósum klæðum á vetri, onkursvegna eru í betri lag. Tey royna at kompensera fyri myrkrið, og ivaleyst er tað eitt gott hugskot.

**Finst eydnan í verðini ella inni í okkum sjálvum?**

Eydnan er nógv treytað av ytri viðurskiftum, so rættast er at læra seg at góðtaka verðina, sum hon er, og søkja inneftir eftir viðurkenning av sær sjálvum. Tað gevur frið. Sjálvsvirði hevur stóran týdning fyri, hvussu tú samspælir við verðina. Gandhi segði, at vit skulu vera tann broytingin, vit vilja síggja í verðini. Og at vera ærlig um okkara persón og handla er í stuttum tað, vit megna. Vit skulu ikki vænta so nógv av øðrum. Onnur fólk gera ikki altíð eftir okkara ynskjum, og tá sita vit mangan eftir á pínubonkinum so nakkalong og vónbrotin. Vanligt er, at vit tá ákæra tey fyri bæði eitt og annað, men í veruleikanum hava tey bara handlað eftir egnari sannføring. Hetta mugu vit rúma, tí allur bundinskapur endar við sorg ella líðing.

**Er lívið ein støðug tráan eftir tryggleika, endurtøkum og eydnu?**

Mennsikjan stúrir fyri ikki at hava nóg mikið og roynir at binda um heilan fingur við at tryggja framtíðina upp á allar hugsandi mátar, hóast ongin trygd er fyri, at vit liva í morgin. Tað er egoið, sum stýrir. Egoið er ongantíð beint nú, men nýtir fortíðina sum modell fyri, hvussu framtíðin kann fara at laga seg. Øll tey fólk, eisini munkar, sum meditera nógv, hava sum endamál at koma burtur úr hesum tankastreyminum. At pendla millum fortíð og framtíð er í veruleikanum at sabotera lívið, sum bara er nú. Lívið er ein støðug tráan eftir eydnu, men vit søkja oftast ikki inneftir og læra okkum at liva í samljóði við tær universellu lógirnar. Ístaðin søkja vit eydnuna í sex, hjúnarbandi, bilum, fótbólti, religión o.s.fr. Vit identifisera okkum við hesi fyribrigdi, ið er tað sama sum at vera eitt við tey.

**Hvat er eitt eydnuríkt lív?**

Tja, ert tú positivur, er grundarlag fyri at vera eydnuríkur. Fyrsti tankin er grundarlag fyri næsta tanka, so tað ræður um at hava tann fyrra góðan. At elska seg sjálvan er eisini eitt sera gott grundarlag fyri eydnuríkum lívi, tí annars veit ein ikki, hvat kærleiki er. Sjálvur eri eg eydnuríkur, tá eg kann vera til gagns fyri onnur, samstundis sum tað kennist gott at vera eg og hava eitt ávíst virði. Um tú hevur hetta við tær, kemur alt annað av sær sjálvum.